gult cyan magenta svart



# Fáa ikki endurgjaldskrav fyri at blokera Fíggjarmálastýrið

*Landsstýrið fer ikki at gera álvara av hóttanini um at senda Starvsmannafelagnum krav um endurgjald fyri at blokera fíggjarmálastýrið undir tí drúgva verkfallinum í fjør*

ÁKI BERTHOLDSEN

Verkfallið hjá Starvsmannafelagnum í fjør fer ikki at fáa fíggjarligar avleiðingar fyri fakfelagið.

Nú er tað nevniliga greitt, at Landsstýrið fer ikki at gera álvara av hóttanini um at krevja endurgjald fyri tær blokadur, sum limir í starvsmannafelagnum settu í verk ímóti fíggjarmálastýrinum úti á Argjum, og ímóti umsitingini í Tinganesi, í sambandi við tað drúgva verkfallið seinasta vár.

Í sambandið við verkfallið, stóðu fólk í fleiri dagar frammanfyri úthurðunum í Fíggjarmálastýrinum og forðaðu fyri, at starvsfólki har slapp til arbeiðis.

Av og á var eisini umsitingin hjá Landsstýrinum í Tinganesi blokerað.

**Hóttu við endurgjaldskravi**

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum var sera misnøgdur um hetta.

*Limirnir í Starvsmannafelagnum lótu hvørki regn ella vind rína við seg, táið tey forðaðu Karsten Hansen og hinum starvsfólkunum í fíggjarmálastýrinum at sleppa til arbeiðis undir verkfallinum í Fjør. Og so vórðu tey hótt við endurgjaldskravi oman á alt, men tað kravið er nú slept.*



Hann segði, at blokadurnar vóru ólógligar og hann boðaði meiri enn einaferð frá, at tá ið verkfallið var av, fór Fíggjarmálastýrið at krevja endurgjald fyri tann miss, sum hevði staðist av, at Starvsfólkið ikki var sloppið til arbeiðis.

Tá ið verkfallið so var av, boðaði hann eisini frá, at hann hevði biðið teir ymsu partarnir í almennu umsitingini gera skaðan upp, sum blokadurnar høvdu kostað, og at hesar uppgerðirnar skuldu vera grundarlagið undir einum endurgjaldskravi ímóti Starvsmannafelagnum.

**Kravið slept**

Men nú er tað greitt, at Starvsmannafelagið fer ikki at fáa nakað endurgjaldskrav frá Landsstýrinum.

Tí Karsten Hansen viðgongur nú, at endurgjaldskravið er slept.

Hann sigur, at hann kann ikki gera annað, enn at ásanna, at hann noyðist at sleppa endurgjaldskravinum.

–Eg má viðganga, at politiskt fæst ikki undirtøka fyri at leggja endurgjaldskrav, sigur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

Hann sigur, at tað er ikki minst hansara egnu flokspolitisku partamenn í tjóðveldisflokkinum, sum eru ímóti at endurgjaldskravið verður lagt.

Men sjálvur ivast hann ikki í, at tað hevði verið rætt at lagt endurgjaldskrav.

– Stóð tað til mín er tað ongin ivi um, at vit høvdu reist endurgjaldskrav.

– Tó má eg eisini viðganga at eg skilji teir væl á ein hátt.

–Men hinvegin, so mugu vit taka tøk av og á. Og fyri meg hevði hetta verið ein spurningur um at seta mørk, og, hvør skal seta hesi mørkini, sigur Karsten Hansen.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at fakfeløg verða hótt við endurgjaldskravi, tá ið tey fara í verkfall.

Tað hendir næstan hvørja ferð. Men tað er ongantíð blivið til meiri enn til hóttanina, tí hvørja ferð, verkføllini hava verið av, eru endurgjaldskrøvini eisini slept.

Vit spurdu Karsten Hansen um hetta ikki er eitt veikleikatekin frá almennum og privatum arbeiðsgevarum og um hetta ístaðin ikki júst er ein ábending til fakfeløgini um, at tey hava fullkomiliga fríar ræsur, tá í ósemjur eru á arbeiðsmarknaðinum.

– Jú, tað kanst tú siga, sigur Karsten Hansen.

Leiðslan í Starvsmannafelagnum hevur frá fyrsta degi tikið endurgjaldshóttanina púra róliga.

Gunnleivur Dalsgarð, formaður Starvsmannafelagsins, hevur altíð sagt, at felagið hevur onki við blokadurnar at gera, men at tær vóru eitt tiltak, sum limirnir sjálvir høvdu funnið upp á, uttan stuðul frá Starvsmannafelagnum.

# Løgið at Karsten Hansen leggur so stórar ætlanir fyri framtíðina

*–Karsten Hansen skuldi heldur roynt at arbeitt fyri at landsstýrið setti tað í verk, sum tað skal seta í verk, heldur enn at arbeiða við ætlanum, sum koma at binda løgtingið fleiri valskeið fram, sigur Heini O. Heinesen, formaður tjóðveldisfloksins á tingi.*

ÁKI BERTHOLDSEN

Tað eru ikki øll, sum eru líka forlipt uppi í ætlanini hjá Karsten Hansen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um at gera eina 10 ára verklagsætlan fyri almennar útbyggingar.

Sum vit hava greitt frá á undanfarnum bløðum, ætlar Karsten Hansen at gera eina 10 ára ætlan fyri, hvussu almennar útbyggingar í Føroyum skulu raðfestast tey næstu 10 árini.

*Karsten Hansen skuldi heldur lagt eina langtíðarætlan fyri, hvussu almenna umsitingin skal vera tey næstu árini, sigur Heini O. Heinesen*



Ein av teimum, sum ikki heldur so avbera nógv um hesa ætlan er Heini O. Heinesen, formaður tjóðveldisfloksins á tingi og sostatt partamaður hjá Karsten Hansen.

Hann heldur, at tað er løgið, at Karsten Hansen skal fara at leggja eina ætlan, sum fer at binda komandi landsstýri og løgting fleiri valskeið fram í tíðina.

– Tað kann sjálvandi vera gott at hava eina ætlan. Men at leggja eina langtíðar útbyggingarætlan kann vera ómetaliga trupult, tí hon fer at verða broytt so hvørt sum tíðirnar skifta.

–Almenna peninganýtslan, eitt nú til ymsar útbyggingar er ein av fáum mátum, sum landsstýrið hevur at stýra búskaparligu gongdini við. Tvs, at tá ið ov nógv ferð er á búskapinum, verður gongdin tálmað við at lækka almennar útreiðslur og øvugt, tá ið ringar tíðir eru.

Tí fer ein slík ætlan at verða nógv broytt so hvørt, og av tí sama dugir hann ikki rættiliga at síggja endamálið.

– Tá skuldi Karsten Hansen nógv heldur gjørt eina langtíðar ætlan fyri, hvussu samfelagið Føroyar skal rekast framyvir. Almenna umsitingin er nógv dýrkað seinastu árini og hon letur seg ikki so lætt broyta, alt eftir, um tíðirnar eru ringar, ella ikki.

– Tí hevði tað verið nógv meiri áhugavert at Karsten Hansen legði eina ætlan fyri, hvussu almenna umsitingin skal vera tey næstu árini, heldur Heini O. Heinesen.

Hann heldur eisini, at ístaðin fyri at leggja stórar útbyggingarætlanir langt fram í tíðina, skuldi Karsten Hansen heldur hugsa meiri um at fingið Landsstýrið at sett tað í verk, sum hendan samgongan hevur sett sær fyri at seta í verk.

Eitt nú hugsar Heini O. Heinesen um Vágatunnilin, sum hann sigur er tvey ár seinkaður av politiskum kleyvarskapi.

– Varð rætt atborið, hevði verið koyrandi undir Vestmannasundi næsta ár. Men kleyvarskapur hevur oyðilagt so nógv, at enn er spakin ikki settur í jørðina. hetta hevur eisini ført við sær, at allar aðrar útbyggingar eru seinkaðar tilsvarandi, eitt nú byggingin av nýggja Smyrli, sigur hann.

gult cyan magenta svart



# Løgreglan í Kastrup misrøkti uppgávu sína



*Frank Trinkle var so heppin, at løgreglan í Kastrup hevði so nógv at gera hósdagin, at hon ikki hevði tíð at fylgja honum og teimum báðum útvístu hollendsku Sea Shepherd limunum. Tískil kundi hann ótarnaður broyta ferðaseðilin og sleppa undan flogtúrinum um Atlantshavið. Mynd: Eirikur Lindenskov*

*Pressutalsmaðurin hjá Sea Shepherd, Frank Trinkle, sum hósdagin skuldi flúgvast til New York, slapp at broyta sín ferðaseðil og fara til Amsterdam ístaðin, tí løgreglan í Kastrup var ovbyrða og ikki hevði tíð at síggja til, at Trinkle fór umborð á rætt flogfar*

RÚNAR REISTRUP

- Har hendi, skulu vit siga, ein feilur her hjá okkum. Vit gjørdu tað mistak, at vit ikki ansaðu eftir at tann útvísti amerikumaðurin fór umborð á rætta flogfar, sigur ábyrgdarhavandi á Station 6 á flogvøllinum í Kastrup, John Vendelbo, í telefoninin spurdur hvussu tað bar til, at Frank Trinkle slapp sær til Hollands hósdagin, hóast løgreglan í Kastrup hevði fingið litið upp í hendi at fylgja honum í flogfarið til New York.

Sum vit skrivaðu leygardagin, fylgdi føroyska løgreglan hósdagin teimum trimum útvístu Sea Shepherd limunum umborð á eitt flogfar í Vágunum, sum skuldi føra teir til flogvøllin í Kastrup. Har skuldi løgreglan á staðnum standa fyri teimum og syrgja fyri at teir báðir útvístu hollendararnir fóru í flogfarið til Amsterdam, og at Frank Trinkle fór umborð á flogfarið til New York, hagar hann var útvístur til.

Men Frank Trinkle broytti sín ferðaseðil, og ístaðin fóru allir tríggir Sea Shepherd limirnir til Amsterdam.

**Høvdu ikki tíð**

John Vendelbo frá Station 6 tekur alla ábyrgdina av mistakinum á seg og kallar tað eitt keðiligt óhapp, sum ikki gjørdist minnið keðiligt av, at málið á onkran hátt hevði ein politiskan undirtóna.

- Man kundi trúð, at alt hetta hendi, tí vit her niðri ikki vildu hjálpa ella okkurt sovorðið, men tað hevur einki við tað at gera, lovar áyrgdarhavandi á Station 6 á flogvøllinum.

Sum orsøk til at mistakið kom fyri, nevnir hann, at politistøðin á flogvøllinum í Kastrup í løtuni er undirmannað vegna feriu, og at løgreglufólkini høvdu sera nógv at gera hósdagin, og tí ikki høvdu tíð til at røkta allar sínar uppgávur til lítar. Løgreglufólk stóðu tó fyri Frank Trinkle, tá hann og teir báðir útvístu hollendararnir komu í land av føroyaflogfarinum.

- Men orsakað av at vit høvdu so nógv annað at gera, fingu løgreglumenninir ikki verið hjá útvísta amerikumanninum, men máttu víðari til aðrar uppgávur.

John Vendelbo sigur, at løgreglufólkini á staðnum tosaðu við teir tríggjar menninar og mettu, at teir fóru at gera, sum teimum varð boðið.

- Men hasin amerikumaðurin fer niður og bookar sín ferðaseðil um, og tað hava vit ábyrgdina av, sigur hann.

**Nú hendir ikki meira**

Løgreglan í Kastrup hevur tikið mistakið til eftirtektar, men fer ikki at gera meira við málið.

- Eg havi minnt løgreglumenninar á støðini á, at teir altso verða noyddir til at fylgja teimum reglum, ið galda fyri slíkar uppgávur, og ikki kunnu loyva sær at misrøkja tær vegna ov stóra arbeiðsbyrðu.

Spurdur um hann heldur, at løgreglan í Føroyum sjálv átti at syrgt fyri, at teir tríggir Sea Shepherd limirnir komu á rætta stað, sigur ábyrgdarhavandi á Station 6, at tað er ein spurningur um starvsfólkatilfeingi.

- Man kundi sagt sum so, at tað eru tey, sum syrgja fyri fráferðini, ið fylgja við teimum ferðandi. Men hinvegin so er tað langur vegur úr Føroyum til Danmarkar, og løgreglan í Føroyum hevur so valt at „spara“ tveir mans við at heita á løgregluna í Danmark um at standa fyri teimum í Kastrup, og tað haldi eg eisini var tað rætta.

Spurdur um løgreglan í Hollandi fekk at vita um tilburðin, sigur Vendelbo:

- Allir tríggir eru farnir úr Føroyum og úr Danmark, so eg haldi ikki at tað loysir seg at gera meira við hatta málið, sigur John Vendelbo. Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini hjá løgregluni í Føroyum, sigur, at í Føroyum verður heldur ikki gjørt meira við málið. So Frank Trinkle fær frið fyri løgregluni, har sum hann er, so leingi hann ikki kemur til Føroya aftur.

*Tíðindaskriv*

## Føroya Kolvetni er komið upp í Agip Marathon bólkin

Agip – Marathon bólkurin, sum umfatar Agip Denmark B.V. (operatørur) og Marathon International Petroleum Ventures Limited, og sum tann 17. mai 2000 hevur latið inn umsókn til Oljumálastýrið í sambandi við fyrsta føroyska útbjóðinarumfarið, boðar frá, at Føroya Kolvetni P/F er komið upp í bólkin frá umsóknardegnum at rokna.

Viðvíkjandi føroyskari oljuleiting, so vil Føroya Kolvetni fáa gagn av altjóða styrkini og royndunum hjá Eni Agip og Marathon. Føroya Kolvetni vil veita bólkinum íkast við teirra týðandi vitan um vinnulívið á staðnum, sum vil vera ómetaliga virðismikið fyri tað íkast, bólkurin kann lata til menningina av oljuídnaðinum í Føroyum.

Við at gerast limur í bólkinum átekur Føroya Kolvetni sær allar ábyrgdir og skyldur viðvíkjandi teirra parti í loyvum, sum Landsstýrismaðurin mátti latið.

aprilia
Royndarkoyring
frá mánadegnum 17/7 til leygardagin 22/7
Støkk inn á gólvið og fá ein royndartúr á einum av okkara motorsúkklum
Pegaso 650
• Skivubremsur framman og aftan
• 1 cylindara vatnkøldur motorur
• 5 gear

SL 1000
• Skivubremsur framman og aftan
• 2 cylindara motorur við AVDC
• 6 gear
• 118 HK
Ein kraftfull maskina, ið liggur væl á øllum vegum. Gevur reina koyrigleði.

SR 125
• Skivubremsur framman
• 1 cylindara luftkøldur motorur
• Automatisk variator gearkassi

Í vikuni verða 4 brúktir skootarar seldir til hægstbjóðandi.
Eisini nógv onnur góð tilboð.
AD-IMPORT
N. Finsensgøta 12 • 100 Tórshavn • Tel. 213000
Sosialurin - 311820